TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Reglugerð fyri Smiðjuna í Lítluvík

Smiðjan í Lítluvík er ætlað framsýningum av myndlist; einstaklingaframsýningum ella minni umfatandi felagsframsýningum.

1. Smiðjan í Lítluvík er ætlað framsýningum av myndlist; einstaklinga-framsýningum ella minni umfatandi felagsframsýningum. Mentamálanevnd býráðsins kann tó í serførum geva loyvi til aðra nýtslu av bygninginum.
2. Avtala um framsýning verður gjørd við Snarskivuna, ið eisini útflýggjar lykil til smiðjuna. Lykil skal latast deildini aftur beinanvegin, tann avtalaða tíðin er úti.
3. Framsýnarin ella tann, ið ábyrgd hevur av framsýningini, hevur skyldu at fara vandaliga um bygningin, og tað er ein treyt, at bygningurin verður frágingin eins og tá komið var.
4. Tað er ikki loyvt at negla í veggirnar, og verða øll listaverk, ið hanga skulu á veggjunum, at festa í teir listar, ið settir eru upp til endamálið, við krókum. Tað er ikki loyvt at negla í listarnar.
5. Tað er ikki loyvt at seta prísir, tøl og onnur frámerki (klistrimerki) á veggirnar. Øll tílík frámerki skulu festast á listaverkini.
6. Sum gjald fyri at nýta bygningin skal framsýnarin lata 10% av upphæddini, ið selt verður fyri. Roknskapurin skal gerast upp, tá ið lykilin verður latin Snarskivuni aftur, ið er mikudag kl. 15:30. Um so er at framsýnarin skal hava pening aftur, skal viðkomandi framleggja rokning hesum viðvíkjandi.
7. Tá ið framsýningin ikki er ætlað sum søluframsýning verður at gjalda kr. 150,- um dagin.